# Føroyingur gevur teknirøð út í Kanada

**13 ára gamli føroyingurin Thor Ulvedal Simonsen, sum býr í Kanada, hevur givið eina teknirøð út, ið hann sjálvur hevur teknað og lagt til rættis. Thor býr í Nunavut í Kanada, sum er tann norðari parturin, har upprunafólkið ella eskimoarar búgva**

TEKNIRØÐ
*Stefan í Skorini*



*Trý ættarlið. Frá vinstru Erling Simonsen, Thor Ulvedal Simonsen við teknirøðini og móðir hansara Rannva Erlingsdóttir Simonsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Teknirøðin hjá Thor ber heitið Paper Boy. Hon snýr seg um ein drong, ið ber bløð út í grannalagnum, og lív hansara. Thor hevur eitt gott hugflog, og hann dugir at finna uppá stuttligar røðir.

Teknirøðin er ikki ein samanhangandi søga, men er býtt í nógvar smáar røðir, ið spenna yvir eina hálva síðu ella so. Thor sigur, at hann onkuntíð fær íblástur frá sínum egna gerandisdegi og frá ymsum hendingum, hann sjálvur upplivir.

– Teknirøðin snýr seg um drongin og gerandisliga lív hansara. Eg tekni eisini um meg sjálvan onkuntíð, og um tær støður eg komi mær úti, ella um vinir mínar, sigur Thor.

Thor fór undir at gera teknirøðir fyri tveimum árum síðani, men hann hevur altíð fingist við at tekna. Nú hevur hann so givið sína fyrstu røð út. Hon er á enskum máli, men er merkt av kanadiskum vendingum.

Drongurin dylur ikki fyri, at hansara stóra fyrimynd á hesum økinum er Dúnaldur Dunna, sum Carl Barks hevur teknað.

Mangt bendir á, at teknirøðin er væl frágingin. Móðir Thor hevur sett seg í sambandi við Føroya Skúlabókagrunn, sum er áhugaður í at keypa teknirøðina til undirvísing í enskum á byrjunarstøði.

Nú Nunavut fekk heimastýri hevur landið eisini fingið ein sokallaðan løgmann. Hann eitur Paul Okalik, og hann hevur skrivað fororðið til teknirøðina hjá Thor. Løgmaðurin, Okalik, plagdi at ansa eftir Thor, tá hann var yngri.

### Nunavut

Thor býr í Nunavut í Kanada.Hesin parturin av Kanada liggur har norðuri í landinum og er einar 2 milliónir ferkilometrar til víddar, men har búgvar bara 30.000 fólk í økinum. Nunavut er umleið ein fimtingur av øllum Kanada.

Nunavut hevur júst fingið heimastýri frá Kanada, og tí er tað ein spennandi tíð at búgva í økinum.

Thor er júst nú heima í Føroyum í frítíðini, men tey fara aftur til Nunavut skjótt. Tey búgva í høvuðsstaðnum, ið eitur Iqaluit, og har búgva eini 5.000 fólk.

Thor er sonur Rannva Erlingsdóttir Simonsen, ið er dóttir navnframa tannlæknan Erling Simonsen, sum í fleiri ár røkti tenn hjá skúlabørnum í Tórshavnar kommunu.

Rannvá er útbúgvin arkitekt og arbeiðir í hesum yrkinum. Harumframt fæst hon við design av kópaskinni og tilíkum. Um summarið plagar familjan at leiga út kajakkir til ferðafólk. Nú tey fara heimaftur skjótt verður hetta tað fyrsta tey fara undir.

Meðan Thor og mamman Rannva hava verið í Føroyum, hava tey sett seg í samband við Bókasøluna, og væntandi verður teknirøðin at fáast til keyps til heystar.

Teknirøðin er ikki bara væl teknað, men søgurnar eru eisini skemtiligar og beinraknar. Tær kunnu lesast av øllum.


**R O K N S K A P U R 2000 P/F F Ø R O Y A L Í V S T R Y G G I N G**

**Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember**

| | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| **Tryggingargjøld** | | |
| Tryggingargjøld, brutto | 115.595.225 | 104.552.557 |
| Endurtryggingargjøld | -4.467.831 | -7.123.885 |
| **Tryggingargjøld netto** | **111.127.394** | **97.428.672** |
| **Inntøkur av íløguaktivum** | | |
| Fastogn | 691.800 | 663.683 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. | 58.921.115 | 56.055.774 |
| **Inntøkur av íløguaktivum tilsamans** | **59.612.915** | **56.719.458** |
| Kursregulering virðisbrøv og afturførdar avsetingar | -160.460 | 13.000.000 |
| **Inntøkur av íløguaktivum tilsamans** | **59. 452.455** | **69.719.458** |
| **Tryggingarveitingar** | | |
| Útgoldnar veitingar | -37.266.034 | -31.087.612 |
| Endurtryggingaranna partur | 11.182.026 | 3.457.034 |
| **Tryggingarveitingar netto** | **-26.084.008** | **-27.630.588** |
| **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| Hækking í lívstryggingartekniskum avsetingum brutto | -105.993.149 | -114.804.966 |
| Broyting í endurtryggarans parti | -11.401.803 | 2.351.355 |
| **Hækking av tryggingartekniskum avsetingum netto** | **-117.394.952** | **-112.453.611** |
| **Lagt í bonusútjavningargrunn** | **-2.436.555** | **-7.031.339** |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi** | | |
| Nýtekningarútreiðslur | -353.397 | -381.286 |
| Fyrisitingarútreiðslur | -4.126.482 | -3.702.959 |
| Løn, eftirløn og ómaksløn | -7.339.473 | -6.776.927 |
| Avskrivingar EDV-tól og innbúgv | -3.472.192 | -2.354.244 |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi tilsamans** | **-15.291.544** | **-13.215.415** |
| **Útreiðslur av íløguaktivum** | | |
| Fyrisitingarútreiðslur | -3.347.413 | -1.923.445 |
| Rentuútreiðslur | 0 | -170.679 |
| Avskrivingar uppá fastogn og skuldarar v.m. | -151.891 | -179.048 |
| Rakstur av fastogn | -668.574 | --506.182 |
| **Útreiðslur av íløguaktivum tilsamans** | **-4.167.878** | **-2.779.354** |
| **Fluttar íløguinntøkur (-)** | **-2.908.513** | **-3.561.475** |
| **ÚRSLIT AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | **2.296.399** | **476.347** |
| **Fluttar íløguinntøkur (+)** | **2.908.513** | **3.561.475** |
| Aðrar vanligar inntøkur | 94.413 | 26.175 |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN ÓVANLIGT ER TIKIÐ VIÐ** | **5.299.325** | **4.063.998** |
| Óvanligar útreiðslur | -238.925 | -398.183 |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT OG AVGJALD** | **5.060.400** | **3.665.815** |
| **Skattir og avgjøld** | **-538.903** | **-577.507** |
| **RAKSTRARÚRSLIT** | **4.521.497** | **3.088.308** |

Í rakstrarroknskapinum eru samanberingartøl fyri stovnin Føroya Lívstrygging.

Í figgjarstøðuni eru samanberingartøl frá byrjunarfiggjarstøðuni hjá partafelagum.

stephanssons hús 314291

**Fíggjarstøða**

| AKTIV | 31.12.2000 | 01.01.2000 |
|---|---|---|
| **Íløguaktiv** | | |
| **Fastogn** | **7.964.801** | **7.977.981** |
| **Fíggjaríløgur** | | |
| Partabrøv | 154.063.694 | 90.798.258 |
| Lánsbrøv | 849.092.724 | 707.131.190 |
| Útlán | 56.903.602 | 183.690.729 |
| Innlán | 109.957.737 | 75.303.360 |
| **Fíggjaríløgur tilsamans** | **1.170.017.757** | **1.056.923.537** |
| **Íløguaktiv tilsamans** | **1.177.982.558** | **1.064.901.517** |
| ***Áogn*** | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum | 7.551.052 | 2.128.922 |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum | 3.783.144 | 1.818.373 |
| Onnur áogn | 1.488.124 | 1.909.094 |
| **Áogn tilsamans** | **12.822.320** | **5.856.390** |
| **Onnur aktiv** | | |
| Innbúgv, edv-útgerð, akfør v.m. | 6.092.593 | 6.338.504 |
| **Onnur aktiv tilsamans** | **6.092.593** | **6.338.504** |
| **Tíðaravmarkingar** | | |
| Renta tilgóðar | 12.899.581 | 12.210.558 |
| **Tíðaravmarkingar tilsamans** | **12.899.581** | **12.210.558** |
| **AKTIV TILSAMANS** | **1.209.797.055** | **1.089.306.970** |

| PASSIV | 31.12.2000 | 01.01.2000 |
|---|---|---|
| **Eginogn** | | |
| Partapeningur | 500.000 | 500.000 |
| Tiltaksgrunnur | 56.518.713 | 56.518.713 |
| Rakstrarúrslit | 4.521.497 | 0 |
| **Eginogn tilsamans** | **61.540.211** | **57.018.713** |
| **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| **Lívstryggingartekniskar avsetingar** | | |
| Bruttoavsetingar | 1.048.882.259 | 947.993.911 |
| Endurtryggjarans partur | -1.392.551 | -12.794.354 |
| **Lívstryggingartekniskar avsetingar netto** | **1.047.489.708** | **935.199.557** |
| **Tiltaksviðurgjald** | **2.160.824** | **3.195.160** |
| **Avsett til bonusútjavning** | **91.241.330** | **88.843.350** |
| **Tryggingartekniskar avsetingar netto** | **1.140.891.862** | **1.027.238.067** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til tryggingarfeløg | 8.472 | 344.171 |
| Frammanundan goldin tryggingargjøld | 5.022.349 | 2.446.726 |
| Onnur skuld | 2.334.162 | 2.259.292 |
| **Skuld, tilsamans** | **7.364.983** | **5.050.188** |
| **PASSIV TILSAMANS** | **1.209.797.055** | **1.089.306.970** |

Tórshavn, tann 1. juni 2001

**Stjórn**

Tummas Eliasen, stjóri

**Nevnd**

Poul Hansen, nevndarformaður
Súsanna Sørensen, næstformaður
Gunnar Holm-Jacobsen
Eyðbjørg Kass
Allan T. Skaalum

**GRANNSKOÐANARÁTEKNING**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F FØROYA LÍVSTRYGGING fyri árið 2000, sum leiðslan hevur sett upp.

**Útinningin av grannskoðanini**

Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og útint grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at í ársroknskapinum eru ikki týðandi skeivleikar ella brek. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlagið og sannanina viðvíkjandi teimum upphæddum og øðrum upplýsingum, sum standa í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til tann roknskaparhátt og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur valt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til nakað fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rættvísandi mynd av stovnsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Tórshavn, tann 1. juni 2001

| | |
|---|---|
| **P/F Grannskoðaravirkið** ***INPACT*** statsaut.revisorar | **Rasmussen & Weihe, P/F** Statsaut. Grannskoðarafelag |
| Jógvan Amonsson **statsaut.revisor** | Klaus Rasmussen **statsaut.revisor** |
| Eilif Petersen **reg.revisor** | Joen Magnus Lamhauge **reg.revisor** |

Úrdráttur úr roknskapi hjá
**P/F FØROYA LÍVSTRYGGING**
Quillinsgarður, 100 Tórshavn, tlf. 31 11 11




Julian roynir nýggjar leiðir:

# Fer til Hull City

**Julian Johnsson hevur gjørt ein tvey ára sáttmála við enska 3. deildarfelagið Hull City. Julian gevst nú í Sogndal og fer at royna seg í Onglandi. Nýggi sáttmálin er nógv betri enn tann, Julian hevði í Sogndal**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hósdagin fór føroyski landsliðsleikarin Julian Johnsson undir ein nýggjan kapittul á yrkisleið síni. Julian skrivaði tá undir við enska felagið Hull City.

– England er meira spennandi enn Noreg, tí tað er her tað hendir. Hull City er eitt stór felag við stórum framtíðarætlanum, og tí er hetta ómetaliga spennandi hjá mær, sigur Julian Johnson við Sosialin.

Julian dylur ikki fyri, at hesin nýggi sáttmálin er nógv betri enn tann gamli í Sogndal, og tað var sjálvsagt ein av orsøkunum til, at hann valdi at fara til Hull. Spælarin kann tí frøa seg um eina munandi lønarhækkan, nú hann fer til Hull at spæla. Umframt lønarhækkan fekk Julian eisini eina eingangs upphædd fyri at skriva undir.

– Umstøðurnar í Hull eru fantastiskar, og vøllurin er sum eitt teppi. Harafturat eru nógvir áskoðarar til heimadystirnar. Hetta er eitt felag við stórum framtíðarætlanum, og tí er tað spennandi at koma til felagið, sigur nýklakti Hull spælarin.

Julian skal byrja í nýggja felagnum 4. juli, men tann 2. juli skal hann standa ta kropsligu royndina, áðrenn sáttmálin endaliga kemur í gildi. Inntil tá spælir hann við Sogndal, men hann má ansa eftir ikki at fáa nakrar skaða.

Julian er ógvuliga fegin um hetta skiftið til Onglands, tí tað er her hann altíð hevur viljað spælt. Julian hevur fyrr verið til royndarvenjingar í bæði Bradford í Englandi og Empoli í Italia, men einki spurdist burturúr hesum.

– Eg havi frætt, at tað er harður kropsligur fótbóltur, ið verður spældur í ensku 3. deild, og tað hóskar sera væl til mín spælihátt, sigur Julian.

### Sáttmálin gekk út

Julian sjálvur hevur ikki loyvi at siga nakað um fíggjarligu viðurskiftini, men hann varð seldur úr Sogndal fyri 50.000 ensk pund. Hetta er umleið 600.000 krónur í føroyskum gjaldoyra.

Sáttmálin hjá Julian við Sogndal gekk út í oktober í ár, og tí kann Julian samráðast við annað felag uttan loyvi frá Sogndal. Hetta er eisini orsøkin til, at hann ikki kostaði enska felagnum so nógv.

Julian fekk tilboð frá Sogndal um nýggjan sáttmála í vetur, men hann vildi ikki skriva undir, tí hann vildi antin heim til Føroyar ella víðari til annað felag.

Hann greiðir frá, at hann kendi seg útifrysta í Sogndal, og tí var tíðin komin at fara víðari. Julian byrjaði í Sogndal á sumri í 1999, tá hann kom úr Kongsvinger.

### Stórt felag

Hóast Hull spælir í fjórðbestu ensku deildini, so er felagið stórt. Felagið hevur ein stóran íleggjara, sum sprænir pening í felagið. Hann eitur Adam Pearson, og hann er ógvuliga fegin um at fáa Julian til Hull.

Á heimasíðuni teamtalk.com sigur hann um Julian, at hann hevur nógvar royndir úr altjóða fótbólti, og at hann bara ein 25 ára gamal.

– Júst tað slagið av spælara, sum vit vildu hava, sigur Adam Pearson, ið er formaður í Hull.

Venjarin hjá Hull er tann navnframi Brian Little, sum áður hevur verið venjari hjá bæði Leicester og Aston Villa í ensku Premier League. Julian gleðir seg nógv til at arbeiða við einum so royndum og kendum venjara.

Umframt Julian hevur Hull keypt fleiri aðrar spælarar, sum skulu vera við til at vinna felagnum uppflyting.

– Vit vóru samdir um at gera ein tvey ára sáttmála, har eg havi møguleika at samráðast um tað triðja eftir egnum ynski, sigur Julian.

Julian greiðir frá, at eini 28 spælarar eru í hópinum, og tí kann tað ganga skjótt báðar vegir hjá honum. Tískil er tað ein fyrimunur ikki at hava ov langan sáttmála.

Kendasti spælarin er óivað Mark Atkins, ið vann ensku Premier League við Blackburn Rovers í 1995. Leikvøllurin tekur 15.000 áskoðarar, og til spennandi dystir, er tað mangan fullsett.

– Nú koyri eg á, og so fái eg at síggja, hvat hendir, sigur Julian at enda.



*Julian Johnsson hevur gjørt sáttmála við Hull City, ið spælir í ensku 3. deild. Felagið er stórt og hevur stórar ætlanir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Føroyski landsliðsspælarin er spentur um skiftið, og hann gleðir seg at arbeiða undir so navnframum venjara sum Brian Little*

*Mynd: Álvur Haraldsen*


**Búgvið í Caravan**

# Hugnið tykkum í Skotlandi



**Atlantic Airways Caravan í Nairn.**
Vit hava tveir ekslusivar "Caravans", sum vit hava serútgjørt til føroyingar. Teir standa á vakra Nairn økinum sum liggur út til strondina.
Nossligu og vælútgjørdu vognarnir eru heilar 42 fermetrar og hava umframt allan vanligan útbúnað, alskyns hentleikar so sum: sjónvarp, video, stereoanlegg, mikroovn, føroyskar leikur, -bøkur og -videobond. Knýtt at økinum er spælipláss, svimjihylur (innandura), hitarúm, solarium, minigolf o.a.

**Nairn:**
Nairn Lochloy er vakurt umráði framvið Morayfjørðin. Tað tekur 20 minuttir til Inverness og 1 tíma við toki til Aberdeen. Tað tekur 10 minuttir til gongu til miðbýin í Nairn.



**Dømi:**
Frá hósdegi til hósdag.
Um 2 vaksin og 2 børn undir 12 ár ferðast saman.

Við í prísinum er flog- og tokferð, gisting og køliskápið er fult við mati tá ið tit koma.
Galdandi frá 31.mai - 02. juli.

**8.528,-***

**Prísir fyri hvønn um:**
6 ferðast saman: 2.627,-*
8 ferðast saman: 2.470,-*

*) Ferðaavgjald sum í løtuni er kr.474,- fyri vaksin og kr. 354,- fyri børn kemur afturat prísinum.

Vit hava tveir "Caravans", ein til 6 og ein til 8 persónar.

SANSIR · TEL 355 355

MB-Tours MB
Tel: 32 21 21 · Fax 32 21 22

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo